# Ársfrágreiðing fyri Vísindasiðseminevndina 2022

Vísindasiðseminevndin er sett við heimild í "Lov om et videnskabsetisk komitésystem og behandling af biomedicinske forskningsprojekter", sum varð sett í gildi við kongligari fyriskipan í 2013, seinast broytt 29. juni 2021.

Nevndin hevur sjey limir, fýra leikfólk og trý fakfólk við granskingarroyndum innan heilsuvísind.

Limirnir í 2022:

- Jens Andreassen, formaður, cand.med og granskari (fakfólk)
- Gunnhild Helmsdal, cand.med og granskari (fakfólk)
- Ann E. Østerø, leiðari á Diagnostiska Deplinum, LS og skrivari í nevndini (fakfólk)
- Oluf Færø, næstformaður, cand.scient (leikfólk)
- Kári Purkhús, cand.scient í lívfrøði og ítrótti (leikfólk)
- Poula Reinert-Petersen, cand.scient.san og leiðari innan eldraøkið (leikfólk)
- Armgarð Arge, cand.theol og tíðindakvinna (leikfólk)

Skrivari: Ann E. Østerø

Endamálið hjá Vísindasiðseminevndini er at tryggja, at heilsuvísindaligar granskingarverkætlanir eru skipaðar á vísindasiðsemiligum tryggum grundarlagi. Sum grundregla skulu rættindi og tryggleiki hjá royndarpersóninum takast framum vísindalig og samfelagslig áhugamál í heilsugransking.

Avgerðir hjá føroysku vísindasiðseminevndini kunnu kærast til NVK (Nationale Videnskabsetiske Komité) í Danmark. Sami kærumøguleiki er fyri avgerðir tiknar av staðbundnu vísindasiðseminevndunum í Danmark.

Umframt lóggávuna fyriheldur nevndin seg til almennu meginreglurnar hjá NVK, soleiðis sum tær eru tøkar á heimasíðuni www.nvk.dk.

## *Fundir og umsóknir*

Nevndin hevði 8 fundir. Nevndin viðgjørdi 22 umsóknir og fyrispurningar viðv. granskingarverkætlanum, harav:

3 nýggjar verkætlanir vóru góðkendar
3 ískoytis- ella broytingarverkætlanir vóru góðkendar
3 verkætlanir fingu longda freist
5 verkætlanir vóru ikki góðkendar
3 verkætlanir kravdu ikki góðkenning
4 fyrispurningar um verkætlanir og innlit fingu svar
1 navnleys fráboðan

Í hvørjum einstøkum føri kom nevndin til eina felags niðurstøðu, og ongin niðurstøða kravdi atkvøðugreiðslu í nevndini.

Av 22 umsóknum og fyrispurningum kravdu 2 longri enn 60 daga viðgerð, tí verkætlanirnar máttu tillagast áðrenn viðgerð.

## *Góðkendar verkætlanir 2022*

1. *"Pneumococcal serotypes in invasive disease and change in pneumococcal carriage and disease prevalence in the Faroe Islands".*
2. *"FarGen 2 – kunningartilfar" – Ískoyti.*
3. *"Sundhedseffekter ved intervaltræning for 30-55 årige kvinder" – Ískoyti.*
4. *"Pneumococcal serotypes in invasive disease and change in pneumococcal carriage and disease prevalence in the Faroe Islands" – Leinging.*
5. *"Heilsa og andsevnir hjá eldri føroyingum – ein 10 ára uppfylgjandi kanning (70 ára kohortan)" – Leinging.*
6. *"Langtíðarárin eftir koronusmittu við Omicron-frábrigdinum" – Ískoyti.*
7. *"Hagfrøðislig forkanning av frábrygdum í arvaeginleikum (DNA) í tí samlaða arvamassanum (genominum) hjá einum lítlum bólki av føroyingum" – Leinging.*
8. *"Árin á rørsluføri og heilsustøðu av FIT FIRST rørsluátaki í føroyskum fólkaskúla"*
9. *"The effect of exercise training and dietary alteration on health status in patients with T2DM"*

### *Virksemi og netverkan*

Formaðurin og nevndarlimur luttóku á "Nordic Secretary Meeting", sum hesaferð varð hildin í Danmark. Umframt umboð frá føroyskum Vísindasiðseminevndini vóru eisini umboð úr Svøríki, Noregi, Finnlandi og Íslandi. Stóra samrøðuevnið á fundinum var GDPR.

Næstformaðurin hevur, eins og undanfarin ár, havt framløgu fyri lesandi á Fróðskaparsetrinum um galdandi vísindasiðsemiliga lóggávu og givið góð ráð í samband við ætlan um granskingarverkætlanir.

Vinaliga

Ann E. Østerø
Skrivari í Vísindasiðseminevndini